# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Kinesarar brúka makt fyri at fáa frið í Tibet, og hetta er mentanarligt fólkadráp - tilætlað ella ei*

*(Dalai Lama)*



*Danmark hevur nú mist 10 hermenn í Afghanistan síðani 2002 (Mynd: DR)*

# Danmark aftur mist hermenn í Afghanistan

**Fýra NATO-hermenn doyðu í einari sjálvmorðsatsókn í Afghanistan í morgun. Tveir teirra vóru danir**

Teir fýra NATO-hermenninir vóru úr teirri sokallaðu CIMIC-deildini, sum arbeiðir við at endurreisa Afghanistan. Teir vóru í býnum Gereshk har suðuri í Helmand-økinum, tá ein bumba brast tætt hjá teimum. NATO-leiðslan í Afghanistan heldur, at talan var um eina sjálvmorðsbumbu, og Taleban kunngjørdi fyrrapartin, at rørslan hevði ábyrgdina av atsóknini í Gereshk.

Ein danur hermaður varð særdur í atsóknini í morgun. Frammanundan ligger ein danskur hermaður á einum hernaðarsjúkrahúsi í Kandahar. Hann varð særdur í gjár, tá deild hansara var á kanningarferð í Upper Gereshk Valley.

Danmark hevur havt hermenn í Afghanistan síðani januar í 2002, og síðani 2006 hava teir havt støð í Helmand-økinum har suðuri í landinum. Tíggju danskir hermenn hava latið lív í Afghanistan.

Í løtuni hevur Danmark 550 hermenn í NATO-deildini í Afghanistan.

# 40 ár síðani My Mai



*Lawrence Colburn var við tyrluni, sum fekk steðgað hópdrápinum í My Lai. Í gjár var hann aftur í My Lai og hitti millum annað ein av bygdarmonnunum, sum hann bjargaði fyri 40 árum síðani (Mynd: AP)*

**Í gjár vóru 40 ár liðin, síðani ein amerikonsk herdeild myrdi meiri enn 500 menn, kvinnur og børn í vietnamesisku bygdini My Lai**

Herdeilidn hevði fingið at vita, at bara limir í uppreistrarrørsluni Vietcong vóru í bygdini, men so var ikki.

Av tilvild kom ein amerikonsk rannsóknartyrla framvið. Teir tríggir menninir í tyrluni sóu, hvat var á vási. Teir gjørdu av at seta tyrluna ímillum amerikonsku hermenninar og bygdarfólkið, og meðan tveir av manningini vendu sínumm maskinbyrsum ímóti sínum landsmonnum, eydnaðist tað tyrluskiparanum at fáa ovastan hjá herdeildini at steðga álopinum.

Ovastin fyri deildini, sum leyp á My Lai, loytnanturin William Calley, varð í 1971 dømdur lívlangt fongsul fyri hópdrápið. Richard Nixon, forseti, broytti dómin til 20 ára fongsul, men William Calley varð latin leysur trý ár seinni.

# Búskaparstøðan í USA verri enn hildið

**Kreppan á amerikanska fíggjarmarknaðinum er verri, enn vit hava givið okkum far um, heldur danski búskaparfrøðingurin Jes Asmussen**

Tað komu tvinni hugvekjandi tíðindi yvir um Atlantshavið um vikuskiftið. Fyrst boðaði fíggingarfelagið JP Morgan frá, at tað hevði yvirtikið partabrøvini í stórbankanum Bear Stearns við at rinda tveir dollarar fyri hvørt partabrævið, og løtu seinni kunngjørdi amerikanski tjóðbankin, at hann hevði gjørt av at lækka diskontorentuna.

- Tað er eingin ivi um, at hetta eru álvarssom tíðindi, sigur leiðandi búskaparfrøðingurin hjá danska Handelsbanken, Jes Asmussen, við Børsen. Hann sigur, at tað tykist, sum at amerikanski tjóðbankin er við at missa tamarhaldið á støðuni, og at hann roynir at loysa hvønn trupulleika fyri seg. Jes Asmussen vísir samstundis á, at amerikanski tjóðbankin hevur gjørt av at lata fíggingarfyritøkurnar læna frá sjálvum tjóðbankanum.

- Eitt tílíkt stig hava vit ikki sæð síðani skrædlið í USA í 1930-unum, og tað vísir, hvussu álvarssom støðan er, sigur búskaparfrøðingurin hjá Handilsbankanum við Børsen.



*Ben Bernanke, stjóri í amerikanska tjóðbankanum (myndin) er um at missa tamarhaldið á støðuni í USA, heldur Jes Asmussen*

## STUTT SAGT

### Løgreglumenn vóru drápsmenn

Ein dómstólur í Ukraina hevur dømt tríggjar fyrrverandi løgreglumenn sekar í at hava beint fyri blaðmanninum Georgiy Gongadze. Ein av monnunum fekk 13 ára fongsul, og felagar hansara skulu sita 12 ár í fongsli. Georgiy Gongadze, sum var kendur fyri sínar atfinningarsomu greinar um ukrainska stýrið og fyrrverandi forsetan Leonid Kutchma, hvarv í septembur í 2000. Tveir mánaðir seinni var líkið funnið høvuðleyst í einum skógi, og hóast umfatandi leiting er høvdið ongantíð funnið. Undir kanningunum kom løgreglan fram á ymiskt, sum bendi á, at Leonid Kutchma, sum fór frá í 2004, hevði havt samband við morðið á Georgiy Gongadze, men tað hevur hann avsannað.

### McCain í Irak

Komandi forsetavalevnið hjá republikanarunum í USA, John McCain, kom í gjár til irakska høvuðsstaðin Bagdad at vitja. Hetta er áttandu ferð, at McCain vitjar Irak síðani innrásina í 2003. Á vitjanini skal McCain tosa við amerikonsku ovastarnar í Irak, og hann ætlar sær serliga at fáa upplýsingar um, hvønn mun tað hevur gjørt, at USA sendi 30.000 hermenn aftur til Irak í fjør. McCain var sjálvur ein av forsprákarunum fyri at senda hermenninar avstað.

### Funnu gamalt herskip

Kavarar, sum hava leitað eftir vrakinum av einum avstralskum herskipi, hava nú funnið vrakið av tí týska herskipinum, sum søkti avstralska skipið undir seinna heimsbardaga. Tann 19. novembur í 1941 brustu týska herskipið DKM Komoran og tað avstralska HMAS Sidney saman úti fyri avstralsku vesturstrondini. Tað avstralska skipið sakk, og øll manningin, 645 mans, doyði. Tað týska skipið sakk eisini, men tað eydnaðist 317 av teimum 397 týskarunum at bjarga sær inn á land, har teir vórðu tiknir og settir í krígsfangalegu. Leitingin eftir vrakinum av HMAS Sidney heldur fram.